Góðu tit øll! Og góðu Allan, Bjørt, Brestir, Gunnar, Helgi, Hilda og Uni!

Tað er mær ein heiður at bera fram eina heilsu á hesum stóra degi á Rásini og ikki minst at fáa tann framíhjárætt at handa tykkum prógvini!

Tit eru nú liðug við 2 ára skúlagongd á Rásini. Tvey ár, har tit so at siga hava verið saman dag og nátt. Tað er ikki so fáir dagar og tímar...

Og nú skulu tit siga farvæl – við staðið, felagsskapin, vinir og starvsfólk – tað er sorgblítt, ongin ivi um tað. Men tá ið hurðar lata aftur, ja so vita vit, at aðrar lata seg upp!

Líka so hart tað er fyri bæði næmingar og foreldur at senda ”børn” síni á ein eftirskúla, líka so hart má tað vera at siga farvæl.

Tað var hart at byrja bæði fyri næmingar og starvsfólk – tað havi eg latið mær fortalt. Tit skuldu venja tykkum við hvønn annan og laga tykkum til at liva í einum felagsskapi.

Nógv suffaðu um at skulu gera mat og arbeiða í køkinum, halda kamarið og ikki nóg mikið við tí – eisini at hava reingerðar vakt í øllum húsinum! Og nógv hildu at hetta skuldu tit ikki læra, tí tað gjørdu foreldrini fyri tykkum.

Tit hava, hesi tvey árini, verið so at siga “í læru til lívið” og krøvini eru nógv at skulu menna bæði persónligar, sosialar og kensluligar førleikar í bæði lestrar- og arbeiðslívi.

At koma " í læru til lívið" kann tykjast strævið, inntil tit vandu tykkum til treytirnar og umstøðurnar. Og nú eru tit útlærd ella í øllum førum væl at veg at gerast sjálvbjargin og harvið taka ábyrgd fyri egnum lívi.

Tit hava ikki bert ment bókligar og verkligar førleikar. Tit hava m.a. eisini fingið royndir í at ferðast sjálvi bæði við bussi og báti, summi hava fingið koyrikort bæði til bil og skutara, tit hava fingið fleiri royndir at keypa inn, gera mat os.fr. fyri at nevna nakrar praktiskar førleikar, sum tit hava lært.

At menna førleikarnar at liva eitt so sjálvstøðugt lív sum møguligt gevur *frælsi*. Hetta er dýrabært fyri hvørt einstakt menniskja.

Rásin er eftir mínum tykki ein sonn sólskinsøga í okkara samfelagi. Staðsetingin er ein “perla” og innihaldið sera væl skipað av sera ágrýtnum, nærløgdum og dugnaligum starvsfólki.

Tit eru fyrstu næmingararnir, ið taka eitt 2 ára skúlaskeið. Hetta sær út til at rigga væl. Starvsfólk hava sagt mær, at tey týðuliga síggja eina positiva broyting hjá tykkum ígjøgnum hesi tvey árini. Eg eri í øllum førum sannførdur um, at tit hava fingið góðan førning at fara víðari út í samfelagið!

Umframt tað góða skúlatilboðið, sum Rásin veitir, so eri eg serstakliga glaður um, at tað hevur eydnast okkum at skipa eitt rúmligari miðnám m.a. við serbreytum – við hesum eigur øllum ungum at standa í boði at fara víðari á miðnám.

Eg veit, at flestu tykkara fara víðari í hetta tilboðið og fari eg at ynskja tykkum blíðan byr og bestu eydnu við tí.

Og enn einaferð takk fyri heiðurin at bera fram heilsan á hesum stóra degin.

Tey, ið fáa prógv eru:

Hilda Poulsen, Havn. Skal á Glasir.(Serbreyt)

Brestir Gasedal, Norðradalur. Skal á Glasir. (Serbreyt)

Gunnar Justinussen, Glyvrar. Skal á Miðnám Kambsdal. (Serbreyt)

Allan Mortansson, Eiði. Skal á Miðnám Kambsdal. (Serbreyt)

Bjørt Hermanssen, Porkeri. Skal á Serbreyt í Klaksvik.

Uni Jensen, Kollafjørður. Skal á Serbreyt Klaksvík.

Helgi Barbá, Kvívík. Er ikki sloppin inn enn og hevur í løtuni einki tilboð